# Aftur hópuppsøgn hjá SAS

Skandinaviska flogfelagið fer at siga millum 1200 og 1500 úr starvi, og onnur skulu hava mini løn enn nú. SAS hevur júst almannakunngjørt, at felagið hevði 750 milliónir krónur í hallí eftir skatt í apríl ársfjórðingi, og at felagið skal spara hálva aðru milliard krónur í rakstrinum. Spariætlanin fer millum annað at hava við sær, at millum 1200 og 1500 fólk verða søgd úr starvi. Herumframt krevur leiðslan, at tey, sum eftir eru, skulu fáa millum 10 og 20 prosent minni í løn og pensjón. SAS sigur, at ferðafólkatalið við flogførum felagsins minkaði meiri enn 17 prosent í øðrum ársfjórðingi.




# Kreppan verður drúgv

Forstjórin í Danske Bank, Peter Straarup, og bankans egnu búskaparfrøðingar draga ikki eina línu, tá tað snýr seg um at gita, hvussu drúgv verandi fíggjarkreppa verður. Búskaparfrøðingar hjá Danske Bank hava sagt, at gongdin fer at venda um stutta tíð, men forstjóri teirra segði í gjár, at kreppan verður drúgv, hóast hækkandi partabrævaprísir kundu bent á tað øvugta. Peter Straarup sigur, at kreppur, sum byrja við, at bankar koma í trupulleikar, gerast vanliga drúgvar, og hann væntar, at tann núverandi verður ikki nakað undantak í so máta.



*Nú er onki lív í klettinum meira*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Træ úr klovnum kletti hvarv

*Skrivað hevur: Rigmor Dam*

*Trø hava røtur, menniskju hava føtur,* segði Salman Rushdie einaferð. Onkuntíð vildi ein ynskt, at tað var øvut.

Í vikuni andaðist ein avhildin danskur politikari, Svend Auken. Hann duldi ongantíð fyri, at hansara pláss var á vinstravonginum, sum verji teirra, ið vegna vanlagnu sína ikki hava somu møguleikar sum vit onnur; minnilutar og einsom, tey, sum eru øðrvísi og ikki passa inn í ráðandi - stundum ræðandi - hugmyndir okkara um, hvussu samfelagið skal innrættast, og hvat skal til, fyri at eydnast sum menniskja.

Sjálvur stóð Svend Auken mangan einsamallur sum drangur í brimi, tá ið tað politiska ódnarveðrið leikaði harðast á. Men røtur hansara stukku so djúpt niður í sunt hugsjónarligt lendi, at hann ongantíð lat seg skrykkja upp.

At enda noyddust røtur hansara tó geva eftir - ikki fyri hugsjónarligum trýsti ella menniskjaligum ágangi, men fyri sjúku, sum ikki kundi grøðast. Slíkum kann ongin verja seg fyri, heldur ikki hugsjónarligir skansar sum Svend Auken.

Um somu tíð sum Sven Auken slepti takinum í jarðarlendinum í hesum lívi, fall eitt annað av heimsins sjáldsomu trøum. Ikki vegna sjúku ella ódnarveður, men menniskjaligt tankaloysi: træið í plantasjuni í Havn; hitt lítla træið, sum móti øllum skili og allari náttúru, hevði fest sínar røtur niður í eina kloyvu í einum stórum kletti. Og har hevur tað staðið erpið og toygt seg upp móti sólini og himmalhválvinum.



Gleðiliga tjóðarhátíðin varð eina løtu vend til sorg, tá Jógvan á Dul gekk túr við hundinum í plantasjuni ólavsøkumorgun. Hvør hevur hjarta til at fara so illa við einari verjuleysari dunnu?

Hetta undranarsama træ hevur seinastu árini verið ein áminning til okkara, sum brúka plantasjuna sum friðskjól í gerandisdegnum. Bæði vaksin og børn hava havt gleði av tí. Børnini, tí tey hava verið bergtingin av, at eitt træ kann vaksa á ella úr einum steini. Tey vaksnu av tí sama, men eisini við at tulka ymiskar ímyndir burtur úr hesum hugnaliga og lívsjáttandi fyribrygdi. Og orðini *Klettur, klovin fyri mær, lat meg fáa lívd hjá tær* renna mær í hug.

Men ikki longur. Nú er onki træ. Tað er nú brotið burtur og eftir stendur ein særd rót.

Tað er ringt at skilja, at nakar fær seg at gera seg inn á nakað so vandaleyst og friðarligt sum eitt træ, ið onki hevur gjørt annað enn at velja sær sítt heim á einum steini heldur enn í moldini, eins og øll hini. Men kanska var tað ovboðið fyri onkran, at eitt neyðarsligt træ skuldi standa har og mótsiga viðtiknu fatan okkara um, at onki kann blóma í kargari jørð? At tað við røttum hugburði og við viðurkenning frá umhvørvinum ber til at trívast, hóast umstøðurnar eru mest sum óliviligar?

Í námsfrøðini læra vit um hugtakið Mælkebøttebarn. Hetta er barnið sum, eins og hagasóljan, megnar at skapa sær eitt eydnuríkt lív við at bróta sosiala arvin, hóast tað hevði alt ímóti sær frá fyrsta degi.

Vónandi fer tann ella tey, sum framt hava hesa óbótagerð, onkuntíð í framtíðini at finna megi til at venda sína vreiði til nakað meira lívsjáttandi og blómandi.



*Hesin smáldrongurin hevur traðkað sínar barnaskógvar í plantasjuni. Nú spyr hann foreldur síni, hvar lítla barnatræið á klettinum er farið. Hvat skulu vit svara honum?*

*Privatmynd*

# Kreat

**Hósdagin letur søluframsýningin Gluggaglæma við kreativum handverki innan pløgg, keramik, glas, tóvirki og øðrum spennandi upp í Müllers Pakkhúsi**

HANDVERK OG LIST
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Enn einaferð kunnu vit fegnast um, at tær báðar, Jónhild Johannessen og Randi Sigurðsdóttir Vang, hava uppfunnið tiltakið Gluggaglæma, har vit sleppa at síggja og keypa tað allarfínasta handverkið, sum fólk hava at bjóða. Hetta verður komandi dagarnar, hósdagin til og við sunnudagin, í Müllers Pakkhúsi í Havn, har hugnalig café eisini er á skránni.

Tær báðar, Jónhild Johannessen og Randi Sigurðsdóttir Vang, upplýsa, at endamálið við Gluggaglæmu er at arbeiða fyri at fáa dygdargott føroyskt handverk og listhandverk fram í ljósið, - bæði tað, ið

# Ulrike S

**Týski barnalæknin, sum hevur stríðst fyri, at allir føroyingar skulu vera kannaðir fyri CTD, er sera fegin um, at Landsstýrið nú ætlar at bjóða øllum at verða kannað**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á middegi í gjár boðaði Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum frá, at Landsstýrið á fundi um morgunin hevði gjørt av, at allir føroyingar eiga at fáa tilboð um at verða kannaðir fyri arvaligu dreparar-